# Kappingarráðið

**Reglugerð nr. 1 frá 10. januar 2008**
**um**
**fráboðan av avtalum v.m., ráðandi støða og misnýtsla**

Við heimild í § 9, stk. 1, 2. pkt. og § 11, stk. 6 í løgtingslóg nr. 35 frá 3. mai 2007 um kapping verður ásett:

**§ 1.** Fráboðan eftir kappingarlógini § 9, stk. 1, 1. pkt., § 9, stk. 3, ella áheitan eftir § 11, stk. 2, 1. pkt. ella § 11, stk. 5, kann latast inn av:

1) eini og hvørjari av fyritøkunum, sum luttaka í viðkomandi avtalu ella samskipaðu framferð,
2) einum og hvørjum samtaki av fyritøkum, sum luttaka í viðkomandi avtalu ella samskipaðu framferð, ella har viðtøkurnar ella samskipaða framferðin er ella fer fram.
3) eini og hvørjari fyritøku, sum einsamøll ella saman við øðrum fyritøkum kann hugsast at hava ráðandi støðu, og
4) eini og hvørjari fyritøku, sum einsamøll ella saman við øðrum fyritøkum kann hugsast at misnýta eina ráðandi støðu.

*Stk. 2.* Um bert ein ella einstakar av luttakandi fyritøkunum, umrøddar í stk. 1, lata inn fráboðan ella áheitan, skal ávísast í fráboðanini ella áheitanini, um hinar luttakandi fyritøkurnar eru kunnaðar um fráboðanina ella áheitanina.

*Stk. 3.* Í felags fráboðanum ella áheitanum skal eitt umboð ávísast, sum hevur heimild til at senda inn og taka ímóti skjølum vegna tað fyritøkuna ella tær fyritøkurnar, ið fráboðanin ella áheitanin verður send inn vegna.

**§ 2.** Ein fráboðan ella áheitan skal sendast til Kappingareftirlitið. Fylgiskjøl kunnu leggjast við sum avrit.

**§ 3.** Fráboðanin ella áheitanin skal innihalda tær upplýsingar og skjøl, ið eru nevnd í skjali K1.

*Stk. 2.* Kappingarráðið kann eftir umbøn sleppa einum undan skylduni at lata inn upplýsingar og skjøl, ið eru nevnd í skjali K1, um ráðið metir, at upplýsingarnar og skjølini ikki eru neyðug til kanning av sakini.

*Stk. 3.* Kappingarráðið skal innan 8 yrkadagar vátta fyri móttøku av fráboðanini ella áheitanini.

*Stk. 4.* Um Kappingarráðið staðfestir, at upplýsingarnar í eini fráboðan, áheitan ella fylgiskjølunum eru ófullfíggjaðar, gevur ráðið fráboðaranum boð um hetta og ásetir eina hóskandi freist at leggja aftrat upplýsingunum.

*Stk. 5.* Fráboðarin skal av sínum eintingum og beinanvegin geva Kappingarráðnum boð um munandi broytingar í teimum viðurskiftum, sum eru ávíst í fráboðanini ella áheitanini, og sum fráboðarin hevur ella eigur at hava kunnleika til.

**§ 4.** Ein fráboðan ella ein áheitan fær rættarvirknað, tá ið Kappingareftirlitið hevur tikið ímóti eini fullfíggjari og rættari fráboðan ella áheitan sum ávíst í § 3.

**§ 5.** Henda reglugerð kemur gildi 10. januar 2008.

Kappingarráðið, tann 9. januar 2008

**Kári Petersen (sign)**
formaður

/Terje Sigurðsson (sign)
deildarleiðari

**FYLGISKJAL 1** **PARTUR A**

# <u>K 1</u>

## SKJAL TIL FRÁBOÐAN AV AVTALUM V.M. TIL KAPPINGAREFTIRLITIÐ

(Við heimild í § 9, stk. 1, 2. pkt. og § 11, stk. 6 í løgtingslóg nr. 35 frá 3. mai 2007 um kapping)

nýtast til

- Umsókn um váttan fyri ikki-uppíløgu
- Umsókn um frítøku, og
- Umsókn um váttan fyri ikki ráðandi støðu ella misnýtslu

-------------------------------------------------------



Skálatrøð 20 · P. O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Telefon: +298 35 60 40 · Telefax: +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo

## 1. Avtalur, viðtøkur og samskipaður atburður

| |
|---|
| Set kross, um søkt verður um:<br>□ váttan fyri ikki-uppíløgu sambært kappingarlógini § 9, stk. 1, 1. pkt., tí treytirnar fyri at verða fevndur av § 6, stk. 1, ikki eru til staðar<br><br>□ frítøku frá forboðnum í § 6, stk. 1, tí treytirnar í § 8, stk. 1, verða mettar loknar, ella<br><br>□ leingjan av longu givnari frítøku, sambært kappingarlógini § 9, stk. 3 |

## 2. Ráðandi støða

| |
|---|
| Set kross, um søkt verður um:<br>□ váttan fyri ikki-ráðandi støðu sambært kappingarlógini § 11, stk. 2, 1. pkt.<br><br>□ váttan fyri ikki-uppíløgu sambært kappingarlógini § 11, stk. 5 |

## 3. Kunnleikin hjá avtalupørtunum til umsóknina

| |
|---|
| Set kross, um:<br>□ hinir partarnir í avtaluni, viðtøkuni ella samskipaðu atferðini eru kunnugir við fráboðanina |

## 4. Upplýsingar um fyritøkurnar, ið senda inn fráboðan

A. Fráboðari

| | |
|---|---|
| Navn: | |
| Partafelagsnummar: | V-tal: |
| Bústaður: | Postnummar og býur: |
| Kontaktpersónur: | Beinleiðis telefonnr.: |
| Telefonnummar: | Fartelefonnummar: |
| Teldupostur: | |
| Vinnugrein: | |



Skálatrøð 20 · P. O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Telefon: +298 35 60 40 · Telefax: +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo

B. Umboð fyri fráboðara

| | |
|---|---|
| Navn og starv: | |
| Bústaður: | Postnummar og býur: |
| Telefonnummar: | Fartelefonnummar: |
| Teldupostur: | |

C. Fráboðari

| | |
|---|---|
| Navn: | |
| Partafelagsnummar: | V-tal: |
| Bústaður: | Postnummar og býur: |
| Kontaktpersónur: | Beinleiðis telefonnr.: |
| Telefonnummar: | Fartelefonnummar: |
| Teldupostur: | |
| Vinnugrein: | |

D. Umboð fyri fráboðara

| | |
|---|---|
| Navn og starv: | |
| Bústaður: | Postnummar og býur: |
| Telefonnummar: | Fartelefonnummar: |
| Teldupostur: | |

Um fleiri umsøkjarar eru, skulu eisini upplýsingar um hesar leggjast hjá.

**5. Tá ið boðað verður frá avtalum, viðtøkum og samskipaðari framferð.**

Um eitt felags umboð er tilnevnt fyri luttakandi fyritøkurnar, verður upplýst:

| | |
|---|---|
| Navn og starv: | |
| Bústaður: | Postnummar og býur: |
| Telefonnummar: | Fartelefonnummar: |
| Teldupostur: | |

**6. Legg við eitt yvirlit yvir tær luttakandi fyritøkurnar í avtaluni, viðtøkuni ella samskipaðu framferðini.**

**7. Váttan**

Undirritaði váttar, at upplýsingarnar í hesi fráboðan eru rættar, at fullfíggjað avrit av øllum teimum í K1 kravdu skjølum eru hjáløgd, og at øll úttalisir eru givin í góðari trúgv. Um váttanin verður givin av einum øðrum enn luttakandi fyritøkunum, ábyrgdast undirritaði, at upplýsingarnar v.m. eru givnar vegna allar tær fráboðandi ella umsøkjandi fyritøkurnar.



Skálatrøð 20 · P. O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Telefon: +298 35 60 40 · Telefax: +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo

Undirritaði og allar tær fráboðandi fyritøkurnar eru kunnugar við revsireglurnar í §§ 30 og 31 í kappingarlógini.

| |
|---|
| Stað og dagfesting: |
| Undirskrift: |
| Stað og dagfesting: |
| Undirskrift: |
| Stað og dagfesting: |
| Undirskrift: |
| Stað og dagfesting: |
| Undirskrift: |

**8. At fylla út og senda inn**

PARTUR A í skjali K 1 verður fyltur út og sendur inn saman við svarunum til teir í pkt. 1-12 í PARTI B nevndu spurningum:

Kappingareftirlitið
Skálatrøð 20
Postsmoga 73
FO-110 Tórshavn
Telefon: +298 35 60 40
Telefaks: +298 35 60 55
Teldupostur: kapping@kapping.fo

**FYLGISKJAL 1** **PARTUR B**

## UPPLÝSINGAR TIL FRÁBOÐANINA

Verður biðið um leingjan av frítøku, sum longu er givin, verður antin nýggj fráboðan send inn ella verður lagt aftrat upprunaligu fráboðanini, um upprunaliga fráboðanin er vorðin ófullfíggjað orsakað av broytingum í marknaðarviðurskiftunum ella í teimum upplýsingum, ið eru givnar av fráboðandi fyritøkunum, sbr. kappingarlógini § 9, stk. 3. Um slíkar broytingar ikki eru hendar, kann fráboðarin bert upplýsa hetta.

Fylgjandi spurningar 1-12 skulu svarast í tann mun, hetta hevur týdning fyri umsóknina.

1. **Avtalur, viðtøkur ella samskipað framferð**
   1.1. Greið frá slagnum, innihaldinum og endamálinum við teirri fráboðaðu avtaluni, viðtøkuni ella samskipaðu framferðini. Sig nágreiniliga um talan er um eina horisontala ella vertikala avtalu.
   1.2. Greið frá hvørjar ásetingar í avtaluni v.m. ella viðurskifti annars kunnu geva grund til kappingarliga umhugsan.

**(Í teimum førum, har fleiri fyritøkur biðja um váttan við heimild í § 11, stk. 2, 1. pkt., eller § 11, stk. 5, skulu niðanfyristandandi spurningarnir undir punktunum 2 – 12 svarast fyri hvørja einstaka fyritøku sær).**

2. **Fíggjarligar upplýsingar**
   2.1. Upplýs umsetningin (1.000 kr.) hjá hvørjari av luttakandi fyritøkunum fyri seinasta roknskaparár.
   2.2. Upplýs samtøkuumsetningin (1.000 kr.) fyri seinasta roknskaparár.

3. **Upplýsingar um tær luttakandi fyritøkurnar.**
   Greið frá virkseminum hjá luttakandi fyritøkunum (við avriti av tí seinasta ársroknskapinum)

4. **Marknaðarlýsing**
   4.1. Greið frá teimum marknaðum, ið hava tilknýti til avtaluna, viðtøkuna, samskipaðu framferðina, atburðin ella teirri ráðandi støðuna (hin viðkomandi marknaðin):

   1. Viðkomandi vørumarknaði ella vørumarknaðum, t.v.s. tann ella teir vørumarknaðir, ið hava tilknýti til avtaluna.
   2. Viðkomandi landafrøðiliga marknaði ella marknaðum fyri hvønn vørumarknað (altjóða, Føroyar ella partar av hesum).

   (Við áheitan eftir § 11, stk. 2, 1. pkt. og § 11, stk. 5, skal eisini niðanfyristandandi punkt 4.1.3. fyllast út)

   3. Atliggjandi marknaðir, t.v.s. allir vørumarknaðir, har ein ella fleiri av luttakandi fyritøkunum eru virknar í einum fyrr ella seinni keypsliði við atliti at einum vørumarknaði, har ein ella fleiri av luttakandi fyritøkunum eru virknar, og her saman ella hvør sær hava ein marknaðarpart á 25



Skálatrøð 20 · P. O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Telefon: +298 35 60 40 · Telefax: +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo

% ella yvir. Hetta er galdandi hóast talan er um veitara- ella kundaviðurskifti millum viðkomandi fyritøkurnar.

4.2. Upplýs fyri hvønn marknað, ið er nevndur í punkt 4.1.:
1. Hin samlaða vøruumsetningin (í virði og stødd) fyri hvørja av luttakandi fyritøkunum.
2 Marknaðarpartin hjá hvørjari av luttakandi fyritøkunum uppgjørdan í virði og stødd.

4.3. Greið frá:

1. Veitarabygnaðinum hjá hvørjari av luttakandi fyritøkunum á innkeypsmarknaðinum(unum), t.v.s. tann ella teir marknaðir, ið veita ílegging til vørur, ið eru partur av tí viðkomandi vørumarknaðinum. Nevn fimm teir størstu veitararnar og partin hjá hesum av innkeypinum av viðkomandi vøru ella tænastuveiting hjá luttakandi fyritøkunum. Upplýs nøvn, bústaðir og møgulig telefonnummur hjá hesum fyritøkunum. Møgulig teldupostadressa og kontaktpersónur hjá hesum fyritøkunum skal eisini upplýsast, um fráboðarin hevur kunnleika til hetta.
2. Útboðsbygnaðinum á sølumarknaðinum(unum) hjá hvørjari av luttakandi fyritøkunum. Nevn í hesum sambandi fimm teir størstu kappingarneytarnar, og met um marknaðarpartin hjá teimum á marknaðunum, ið eru nevndir í punkti 4.1. nøvn, bústaðir og møguligt telefonnummar hjá hesum fyritøkunum. Møgulig teldupostadressa og kontaktpersónur hjá hesum fyritøkunum skal eisini upplýsast, um fráboðarin hevur kunnleika til hetta.
3. Eftirspurningsbygnaðinum á sølumarknaðinum(unum) hjá hvørjari av luttakandi fyritøkunum, herímillum kundakonsentratión, kundabólkar, kundaforrættindi og vørusundurbýting. Nevn í hesum sambandi fimm teir størstu kundarnar og partin hjá hesum av søluni av viðkomandi vøru ella tænastuveiting hjá luttakandi fyritøkunum. Upplýs nøvn, bústaðir og møgulig telefonnummur hjá hesum fyritøkunum. Møgulig teldupostadressa og kontaktpersónur hjá hesum fyritøkunum skal eisini upplýsast, um fráboðarin hevur kunnleika til hetta.
4. Útbýtingarbygnaðinum á sølumarknaðinum(unum) hjá hvørjari av luttakandi fyritøkunum, t.v.s. søluhættir og tænastunet, herímillum um sølan hjá teimum luttakandi fyritøkunum verður framd gjøgnum fyritøkurnar sjálvar ella gjøgnum triðjamann.
5. Týdningarmiklastu samstarvsavtalunum, sum tær luttakandi fyritøkurnar hava gjørt sínámillum ella við triðjamann (horisontalar ella vertikalar) á teimum marknaðunum, ið eru nevndir í punkti 4.1., t.d. um gransking og menning, loyvir, felags framleiðslu, útbýting v.m.

## 5. Samtøkuupplýsingar

5.1. Um nøkur av luttakandi fyritøkunum er partur av eini samtøku, skal um viðkomandi fyritøku(r) upplýsast navn, bústaður, heimstaður og virksemi hjá móðurfelagnum, t.v.s. um allar fyritøkur og persónar, ið hava avgerðandi ávirkan á tær luttakandi fyritøkurnar.

5.2. Hevur nøkur av luttakandi fyritøkunum ella samtøkubundnu fyritøkunum samanfallandi virksemi á øðrum marknaðum enn teimum, ið eru nevndir undir punkti 4.1?

## 6. Atgongdin til marknaðin og møgulig kapping

6.1. Lýs tey viðurskifti, ið kunnu vera av týdning fyri fyritøkur, ið hava ynski um at fáa atgongd til teir marknaðir, ið eru nevndir í punkti 4.1. Hetta kann t.d. vera:

1. Ogn av patenti, serkunnleika, vørumerki og øðrum ólikamligum ognarrætti.
2. Atgongd til veitingar, m.a. til ráevni.
3. Atgongd til neyðugt undirstøðukervi, kunda- ella veitaratrúskap, lógarásett krøv v.m.



Skálatrøð 20 · P. O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Telefon: +298 35 60 40 · Telefax: +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo

6.2. Um nýggj fyritøka innan tey seinastu trý árini hevur útvegað sær atgongd til teir marknaðir, ið eru nevndir í punkti 4.1., skulu nøvn, bústaðir og møgulig telefonnummur á hesum fyritøkum upplýsast.

**7. Grundgeving fyri váttan um ikki-uppíløgu sambært kappingarlógini § 9, stk. 1, 1. punktum.**

7.1. Upplýs í sambandi við umsókn um váttan um ikki-uppíløgu, hvørjar grundgevingar fráboðarin metir seg hava fyri, at kappingarlógini § 6, stk. 1 ikki skal nýtast.

**8. Grundgeving fyri frítøku eftir § 8, stk. 1 frá forboðnum í kappingarlógini § 6, stk. 1**

8.1. Upplýs í sambandi við fráboðan um frítøku eftir § 8, stk. 1, á hvønn hátt avtalan v.m.:

1. Er við til at fremja virkisførið í framleiðsluni ella útbýtingina av vørum ella tænastuveitingum v.m. ella styðjar teirri tøkniligu ella fíggjarligu menningini.
2. Tryggjar brúkarunum ein hóskandi part av fyrimununum við hesum
3. Ikki áleggur fyritøkunum avmarkingar, ið eru óneyðugar til tess at náa hesi mál, og
4. Ikki gevur fyritøkunum møguleika fyri at útihýsa kapping á einum munandi parti av viðkomandi vørunum og tænastuveitingunum v.m

**9. Grundgeving fyri váttan um, at fyritøkurnar hvør sær ella saman ikki hava ráðandi støðu sambært kappingarlógini § 11, stk. 2, 1. punktum ella fyri fráboðan um ikki-uppíløgu sambært § 11, stk. 5**

9.1. Hvørji viðurskifti gera, at hin ella tær luttakandi fyritøkurnar ikki hava ráðandi støðu? Fylgjandi viðurskifti kunnu m.a. føra við sær, at ein ella fleiri fyritøkur hava ráðandi støðu:

- Marknaðarpartur
- Marknaðarforðingar
- Fíggjarlig styrki
- Atgongd til útgerðarkeldur
- Patent, loyvir (licens), vørumerkir ella serkunnleiki
- Ræði á undirstøðukervi
- Innkeyp, framleiðsla ella útbýting
- Vertikal integratión
- Útvaldar avtalur við veitarar og kundar

9.2. Hvussu og í hvønn mun kunnu ein ella fleiri fyritøkur á marknaðinum virka óheftar av hinum kappingarneytunum við áseting av virkisparametrum t.d. prísur, handils- og gjaldsviðurskifti ella kvalitetur.

9.3. Greið frá viðkomandi atferð, og grundgev fyri, hví talan ikki er um misnýtslu av ráðandi støðu.

**10. Gev upp aðrar møguligar upplýsingar, ið kunnu vera av týdningi fyri viðgerðina av umsóknini**



Skálatrøð 20 · P. O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Telefon: +298 35 60 40 · Telefax: +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo

**11. Almannakunngerð**

Um almannakunngerð av nøkrum av innlatnu upplýsingunum kann verða til skaða fyri ein av luttakandi fyritøkunum, skal ávísast hvørjar upplýsingar, ið talan er um. Upplýs orsøkina til, at almannakunngerð kann verða til skaða fyri fyritøkuna.

**12. Hjáløgd skjøl**

Til fráboðanina skal leggjast við:
Avtalan, viðtøkan ella ein lýsing av samskipaðu framferðunum.
Avrit av seinasta ársroknskapinum hjá luttakandi fyritøkunum.
Avrit av møguligum marknaðarfrágreiðingum, kanningum og sundurgreiningum av týdningi fyri fráboðanina/áheitanina.



Skálatrøð 20 · P. O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Telefon: +298 35 60 40 · Telefax: +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo